ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

***Skrásetingar nr.:***

**L-E012-2**

# Leiðbeining
# um
# markvirði fyri evni og tilfar

### Alment

Henda leiðbeining greiðir frá fyribrigdinum markvirðir fyri evni og tilfar (fyrr nevnt heilsufrøðilig markvirðir, stytt til HMV), og hvussu markvirðini skulu nýtast. Markvirði verður stytt til **MV**.

### Áseting av markvirðum.

Dálking av andingarluftini við evnum og tilfari kann elva til heilsuskaða. Tað er tí ásett markvirði fyri, hvussu nógv tann luftin vit anda í okkum í mesta lagi kann verða dálkað.

Grundarlagið fyri áseting av markvirðum er tann atkomuliga vitan um skaðaárinini av viðkomandi evni.

Eitt fyrimyndarligt markvirði ásetur eina styrki, sum ikki vil elva til heilsuskaða hjá viðkomandi, sum arbeiðir við hesum evni alt sítt lív. Galdandi listi yvir markvirðir er tað nærmasta vit kunna koma hesum málsetningi.

Er dálkingin minni enn markvirði, skuldu vanlig frísk fólk ikki fingið skaða av hesum, hóast tey arbeiða við slíkum 8 tímar dagliga í eitt heilt lív.

Av tí, at ávirkan uttanífrá ofta hevur ymisk árin á fólk, sammet við hvussu ójavnt fólk sólbrennast, er tað eingin loyna, at nøkur fólk kunna fáa hissini ampa við styrkjum, sum liggja undir mark-virðinum, ella enntá fáa vinnuliga sjúku av hesum.

Við áseting av markvirðum, hevur tað síðan 1981 verið roynt at tikið omanfyri nevndu sjónarmið við Mótstríðandi teknisk og fíggjarlig fyrilit kunna ofta avmarka slagkraftina av teimum heilsuligu próvgrundunum, tá tað endaliga markvirði skal ásetast.

Próvtilfarið um skaðaárini av teimum ymisku evnunum kann fáast við av venda sær til Arbeiðseftirlitið.

### Listi yvir markvirði

Listi yvir markvirðir fæst frá Arbeiðseftirlitinum. Hann verður vanliga førdur ajour annað hvørt ár og plagar tá eisini at innihalda ein fráboðanarlista um ætlaðar broytingar og um markvirðir fyri nýggj evnir.

***Lógarheimild:***

Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar frá 25. august 1983.

***Útgivið fyrstu ferð:***

**1. september 1988**

***Seinastu broytingar:***

**Eindir**

Markvirðini fyri gass og guvu (damp) verður givið upp í rúmd pr. rúmd, vanliga sum ppm (parts pr. million), svarandi til tal av $cm^3$ dálkaðum evnum pr. $m^3$ luft.
Styrkin kan eisini gevast upp í vekt pr. rúmd, $mg/m^3$ t.v.s. milligramm dálkað evni pr. $m^3$ luft.
Fyri evnir sum finnast sum tægrar í luftini (t.d. asbest), verður markvirði givið upp sum tægratal pr. $cm^3$ luft.

## Miðalvirðir

Listin yvir markvirðini vísir vanliga tey hægst loyvdu miðalvirðini fyri ein 8 tímars arbeiðsdag. Styrkin kann soleiðis verða omanfyri markvirði ein part av arbeiðstíðini, um hon er tilsvarandi lægri hin partin av tíðini. Sum miðalvirði gjøgnum allan arbeiðsdagin má luftdálkingin ikki verða hægri enn markvirði sigur.
Tað verður tó ikki loyvt tilvildarliga at fara langt út um ásetta markvirðið fyri ein arbeiðsdag.
Viðv. útrokningum av miðalvirðum og hvussu langt loyvt er at fara út um markvirðini v.m. - sí Arbeiðseftirlitsins reglugerð nr. R-E012-1 um áseting av markvirðum fyri evni og tilfar.

## Loftsvirðir

Ávís evni, ið hava bráfeingis árin, hava eitt markvirði, sum ongantíð má farast út um. Hetta markvirði nevnist loftsvirði.
Í markvirðislistanum eru slík evni merkt við **L** í teiginum fyri viðmerkingar.

## Upptøka gjøgnum húðina

Nøkur evni, serliga flótandi evni, kunna treingja gjøgnum húðina, sjálvt um henda er heil, og soleiðis koma inn í blóðrenslið. Slík evni eru í listanum merkt við **H.**

## Krabbameinselvandi evni

Evni, sum hildin verða krabbameinselvandi, eru sett á ein serligan lista í marksvirðislistanum.

## Máting av luftdálking

Tað kann verða neyðugt at máta slag og styrki av luftdálkingini á arbeiðsstaðnum. Úrslitini verða samanborin við galdandi markvirðir.
Tað eru reglur fyri, hvussu ein kann rokna seg til tað hægst loyvdu luftdálking, tá talan er um fleiri evnir samstundis - sí reglugerð nr. R-E012-1.
Tá fleiri luftdálkandi evni eru til staðar samstundis, kunna tey hava antin styrkjandi ella viknandi ávirkan á hvørt annað.
Tá luftdálking verður mátað, skal virkisins trygdarskipan verða við. Mátingarnar skulu gerast undir vanligum rakstrarumstøðum og umfata serligar tyngjandi partar av framleiðsluni.
Serliga skal ansast eftir viðurskiftum sum kunna elva til serliga dálking, eitt nú byrjan og steðgur av eini framleiðslu, fyllingar/tømingartiltøk, ella reingerðing og umvælingararbeiði.

## Nýtsla av markvirði (MV)

Evni og tilfar kann verða vandamikið at anda í seg, at fáa á húðina og við at fáa hetta í seg gjøgnum munnin.

*Vandi at anda í seg***.** Tá arbeiðsstaðið verður innrættað og við útinnan av arbeiði skal:
a. komast undan óneyðugari ávirkan av evni og tilfari,
b. dálkað luft skal, har hetta er gjørligt, beinast burtur, har henda kyknar upp.
c. ávirkan av luftdálking skal verða so lítið, sum tað í roynd og veru kann lata seg gera, og
d. ásett markvirðir skulu yvirhaldast.

Tað er ikki nóg mikið at yvirhalda markvirðini, um hini 3 punktini ikki eru uppfylt.
*Vandin við húðsamband***.** Høvuðsreglan er, at tað skal komast undan, at evni og tilfar kemur í samband við húðina. Um evni ella tilfar kann treingja gjøgnum húðina (merkt við **H** í listanum) er tað serliga

vandamikið.

*Vandin við at fáa nakað í seg gjøgnum munnin.* Markvirðini siga einki um vandan, um ein fær nakað evni ella tilfar í seg gjøgnum munnin. Er ein slíkur vandi, skal hetta týðuliga tilskilast í merkingini og í brúkaraleiðbeiningini. Víst verður til reglugerð nr. R-E012-2 um vanda- og trygdarásetningar og okkara brúkaraleiðbeining nr. L-E012-3 um evni og tilfar.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, hin 1. sept. 1988

Eli Davidsen, stjóri (sign.)